TING- HELLAN

# Tað eru nógv løg í




**Spenningurin um hvørjir flokkar fara at vinna valið tykist vera so stórur sum sjáldan áður. Harafturat er í øllum flokkunum stórur spenningur um fleiri aðrar spurningar, sum næstu dagarnar fara at verða snaraðir og vendir í politiska umhvørvinum**

TINGHELLAN
FÓLKATINGSVALIÐ
*Jóannes Hansen*



Í dag er fólkatingsval. Hetta er 23. fólkatingsvalið, síðani Føroyar í 1948 fingu rætt til tveir fólkatingssessir. Føroyingar hava verið á vali hvørja ferð burtursæð frá seinna valinum í 1953 (grundlógarvalið). Ta ferðina vóru tað bara Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum bjóðaðu seg fram, og Johan Poulsen og Petur Mohr Dam vórðu tískil valdir uttan atkvøðugreiðslu.

Fólkaflokkurin tók ikki lut í fólkatingsvalunum í 1950 og teimum báðum í 1953. Síðani á valinum í 1957 hevur Fólkaflokkurin bjóðað seg fram hvørja ferð. Tjóðveldisflokkurin hevur bjóðað seg fram hvørja ferð síðani á valinum í 1973. Frammanundan høvdu tveir tjóðveldismenn roynt seg á uttanflokka listum. Teir vóru Karsten Hoydal í 1960 og Zakarias Wang í 1971.

Sjálvstýrisflokkurin bjóðaði seg ikki fram á teimum seks valunum, sum vóru frá seinna valinum í 1953 og til og við valinum í 1968, og hann stillaði heldur ikki upp í 1975. Annars hevur hann bjóðað seg fram hvørja ferð. Miðflokkurin luttók fyrstu ferð á fólkatingsvalinum í 2001.

Um mált verður í talinum á valevnum, so hevur broytingin verið stór seinnu árini. Í 1984 stillaðu fimm flokkar 48 valevni upp. Hesa ferð eru flokkarnir sjey, og samlaða talið á valevnum er 107: Fólka-flokkurin 22, Sambandsflokkurin 23, Javnaðarflokkurin 22, Sjálvstýrisflokkurin 7, Tjóðveldisflokkurin 21, Miðflokkurin 10 og Uttanflokkalistin bjóðar 2 valevni fram.

Býtið millum kvinnur og menn er ikki so lítið broytt seinastu 21 árini. Á valinum 10. januar í 1984 vóru seks kvinnur ella 12,5 prosent av valevnunum kvinnur. Hesa ferð eru 33 av 107 valevnum ella 29,9 prosent av valevnunum kvinnur.

Valluttøkan hevur ongantíð verið hægri, enn hon var í 2001, tá ið 80,0 prosent ella 28.498 av teimum 33.106, sum høvdu valrætt, vóru á vali. Lægsta valluttøkan á fólkatingsvalunum síðani 1948 var 14. oktober í 1950, tá ið bara 22,0 prosent vóru á vali. Ta ferðina vóru tað bara heimastýrisflokkarnir - Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin - sum bjóðaðu seg fram. Lægsta valluttøkan, síðani allir teir stóru flokkarnir fóru at bjóða seg fram hvørja ferð, var 12. desember í 1990, tá ið ikki fleiri enn 54,4 prosent vóru á vali.

**Stórur spenningur**

Sambært veljarakanningini, sum sunnudagin varð kunngjørd í útvarpinum, røgva teir stóru flokkarnar mest sum borð um borð í kappingini um teir báðar sessirnar, sum Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava átt síðani á valinum 20. november í 2001. Tá vunnu hesir báðir flokkarnir sessirnar frá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum, sum høvdu verið á Christiansborg síðani í 1998. Valið fyri trimum árum síðani var serstakt á tann hátt, at tað var fyrsta ferðin síðani 1948, at báðir flokkarnir, sum høvdu havt umboð á Fólkatingi, mistu sessirnar.

Í Gallup kanningini hjá Útvarpinum, sum varð kunngjørd sunnudagin, varð eisini nevnt, hvørji valevni lógu best fyri at vinna sessirnar. Kanningin segðist vera grundað á 663 svar. Útvarpið nevndi einki um, hvussu stóra undirtøku høvuðsvalevnini høvdu fingið, og tað er væl skiljandi. Tá ið 107 valevni eru at velja ímillum, eigur grundarlagið fyri at bólka í meiri enn bara flokkarnar at vera rættuliga ivasamt.

Men tað einki at ivast í, at boðskapurin sunnudagin um, hvussu støðan segðist at vera á ymsu listunum, hevur havt stórt árin á, hvussu endaliga støðutakanin hjá nógvum veljarum hevur verið. Tað er upplagt, at fokus nú er sett á tey valevnini, sum vórðu nevnd sunnudagin. Fyritreytirnar hjá teimum, sum ikki vórðu nevnd, og sum harvið fingu signal vóru givin um ikki fóru at hava nakran serligan møguleika, eru verri nú, enn tær vóru undan sunnudegnum. Og møguleikarnir hjá teimum, sum vórðu nevnd, eru betri at røkka góðum persónligum vali, enn tær vóru undan sunnudegnum.

Fólkatingsvalið er spennandi, og serliga millum politikararnar verður tað nærlisið og greinað nógv meiri enn fyri bara at fáa svar uppá, hvørjir flokkar og persónar skulu niður á danating. Í sær sjálvum er spenningurin um sjálvt valið so stórur, sum hann sjáldan hevur verið áður.

**Høgni og Tórbjørn**

Í Tjóðveldisflokkinum er neyvan nakar ivi, at Høgni Hoydal fer at fáa flestar persónligar atkvøður. Á valinum 20. november í 2001 fekk hann 2.641 atkvøður. Høgni var landsstýrismaður, og eykamaðurin, Tórbjørn Jacobsen, var í Fólkatinginum fyri Høgna, inntil fullveldissamgongan var skrædnað. Tórbjørn fekk 870 atkvøður í 2001. Munurin var so mikið stórur millum teir báðar fremstu, at tað er illa hugsandi, at Tórbjørn fer at hava nakran møguleika at gera nakað við Høgna.

Men turbolensurin í Tjóðveldisflokkinum síðani í oktober og fram til uppstillingina til fólkatingsvalið fer sjálvandi at hava við sær, at tað fer at verða hildið serliga vakið eygað við, hvussu tað fer at hilnast í Tjóðveldisflokkinum. Serliga hjá Tórbirni og Høgna. Tað verður skjótt til, at tað fer at verða roknað sum álitisváttan ella misálitisváttan, um tað fer at hilnast betri ella verri hjá teimum báðum, enn tað gjørdi fyri góðum trimum árum síðani.

Sambært Útvarpinum er Sjúrður Skaale við í kappingini um plássið undir formanninum. Tað er áhugavert, tí talan er um skrivaran hjá fyrst Tórbirni Jacobsen og síðani Høgna Hoydal. Sjúrður hevur verið í persónligum og ágangandi valstríði, har hann hevur latið tað skyggja ígjøgnum, at tað er best, um umboð verður valt á danating, sum hevur fólkatingsstarvið sum fulltíðar starv. Tað kann ikki takast sum annað enn áheitan á veljararnar um heldur at velja Sjúrð enn teir báðar, sum hann hevur arbeitt fyri. Teir hava báðir løgtingssess at røkja.

Sjúrður var á tjóðveldislistanum fyri stívliga trimum árum síðani. Tá var persónliga atkvøðutalið hjá honum 272.

**Jóannes og hini**

Á javnaðarlistanum tykist eingin ivi at vera um,at Jóannes Eidesgaard fer at fáa flestar atkvøður. Á valinum 20. november í 2001 valdu 3.689 Jóannes, sum harvið fekk fleiri atkvøður enn nakar annar. Hóast hann fekk fleiri atkvøður í 2001, enn hann fekk, tá ið hann varð valdur í 1998, og hóast Javnaðarflokkurin fór frá 22,7 í 1998 og til 23,4 prosent av atkvøðunum í 2001, so varð Jóannes ikki afturvaldur, tí flokkurin misti mannin.

Hóast Jóannes uttan iva eisini hesa ferð verður ovastur hjá Javnaðarflokkinum, so er persónliga atkvøðutalið hjá honum ikki lítið áhugavert. Nú hevur hann verið løgmaður í eitt ár, og valið í morgin er fyrsta og ivaleyst einasta høvið hjá veljarunum kring alt landið í hesum valskeiðnum at geva løgmanni skoðsmál.

Útvarpið segði sunnudagin, at John Johannesen